**FYLGISKJAL 2**

Viðmerkingar í mun til brunaviðurskiftini

**Manglar v.m.:**

- Statiskar útrokningar fyri allan bygningin, sum eisini umfata brunatekniskar útrokningar av konstruksjónum, og sum er undirskrivað av einum góðkendum statikara (Bernt Suiakkanen fra Cowi hevur sent eina fyribils rapport).

- Brunatekniskur ráðgevi Cowi, ella ein annar, sum kommunan kann góðkenna, skal vátta, at bygningurin er bygdur í samsvari við tað góðkenda brunatekniska projektið/strategi.

- Brunatekniskur ráðgevi skal vátta, at brandventilatiónir eru gjørdar sambært brandstrategirapportini.

- Rýmingarvegur frá hædd 07 (ventilatiónsrúm á tekju) væntar.

- Har rýmingarleið gongur út á lendið, skal lendið vera gjørt soleiðis, at sleppast kann burtur frá bygninginum.

- Tekniskar skipanir skulu roynast og góðkennast av DBI/RM,

- Innrættingarætlan fyri samkomuhøli (hølir til fleiri enn 150 fólk) skal fyriliggja og góðkennast av myndugleikanum.

- Brunaplanir skulu hangast upp í skúlanum eftir avtalu við kommununa:
    1. planir fyri allan bygningin verða hongdar upp við høvuðsinngongdina
    2. planir fyri hvørja hædd verða hongdar upp við trappur í atrium
    3. planir fyri hvørja hædd verða hongdar upp í forrúmi til brandtrappur á øllum hæddum
    4. umframt aðrastaðni í bygninginum, t.d. í niðastu hædd við sal/atrium og har rýmingarleið gongur ígjøgnum onnur uppihaldsrúm.

- Skeltir við mest loyvda tali av fólki skal hangast upp í bygninginum:
    - Við inngongd, at bygningurin er góðkendur til 1.500 fólk.
    - Í atrium , góðkent til 1.100 persónar, treytað av at restin av skúlanum ikki verður brúktur.
    - Í høllini, góðkent til 800 persónar
    - Í multifunktiónshøllini, góðkent til 130 fólk
    - Í kantinuniøkinum, góðkent til 200 fólk
    - Osv.

- Rýmingar- og panikkljós skulu góðkennast á staðnum.
  Av tí at nógvir glasveggir eru, gerast rýmingarleiðirnar í støðum ógreiðar. Hetta er serliga galdandi á hædd 02, í økinum við bókasavnið og timburverkstaðin og má støða takast til, hvørjar broytingar eru neyðugar.

- Við ABA-alarm skulu kunna nýtast sum vanligt, inntil sløkkiliðið er á staðnum og yvirtekur stýringina við lykli.

- Vegir, parkering og uttandura økini eru ikki liðug.

- Op er í brunadeildarveggjum og skilagólvi har t.d. tekniskar leiðingar vera førdar ígjøgnum.

- Rakstrar- og viðlíkahaldsætlan skal fyriliggja, sí notat, fylgisskjal 4.